

[www.oljan.fo](http://www.oljan.fo)

**Jan Müller** 25 - 06 - 2012

# Suðurkorea vil brúka milliardir í Grønlandi

Tað eru ikki bara kinesarar, sum eru til reiðar at brúka nógvar pengar í Grønlandi fyri at fáa fatur á ráevnunum har. Nú siga grannar teirra í Suðurkorea, at teir eru eisini til reiðar at gera risastórar íløgur í ráevnisvinnuna í Grønlandi. Berlingske Tidende skrivar frá sínum keldum, at suðurkoreanar eru sinnaðir at brúka nógvar milliardir krónur til Kvanefjeld-námið, sum hevur ymisk evni, ið hava alstóran týdning fyri hátøknivinnuna. Talan er um almennan og privatan kapital, og sambært keldunum eru íleggjararnir sinnaðir at leggja í minsta lagi 15 milliardir krónur í námsverkætlanina, sum avstralska felagið Greenland Minerals and Energy eigur. Stjórin í Greenland Minerals and Energy, Ole Ramlau-Hansen, sigur við Berlingaran, at eftir eitt árs rakstur fer verkætlanin at geva Grønlandi umleið eina milliard krónur í skattainntøku um árið. Sambært avtalu skulu Grønland og Danmark býta inntøkurnar av námsvinnu. Herfyri frættist, at kinesarar umframt at gera íløgur í jarnnám nærhendis Nuuk og íløgur í havnir og flogvallir í Grønlandi, eisini umhugsa at fara at leita eftir urani í grønlendsku fjøllunum.